

*Robin Clementsen hevur stórar ætlanir. Hann skal renna og ganga úr Skagen til Gibraltar*

# SKAL RENNA ÚR SKAGEN TIL GIBRALTAR

**Robin Clementsen, sum í mars í ár rann av Viðareiði til Sumbiar, skal komandi mars renna langa teinin úr Skagen norðast á Jútlandi, til Gibraltar**

Tað tók Robin Clementsen 35 og ein hálvan tíma at renna teinin av Viðareiði til Sumbiar, men tað fer at taka munandi longri t´ðið at renna og ganga tann 3.466 kilometra langa teinin úr Skagen til Gibraltar.

Hugskotið kom so líðandi, tá hann í vár í 3-2 segði, at næsta avbjóðingin fó at verða at renna tvørtur um Jútland.

- Eg segði ikki tá, hvønn veg eg fór at renna, og síðani er hugskotið komið at renna úr Skagen til týska markið. Men so hugsaði eg, hví steðga har, um eg annars eri væl fyri. Tí havi eg sett mær sum mál at renna og ganga allan vegin til Gibraltar, sigur Robin Clementsen.

Ferðin byrjar 14. mars næsta ár og Robin Clementsen roknar við, at tað fer at taka 12 vikur at koma leiðina fram.

Hann hevur tryggjað sær ein sonevndan rennivogn, har hann hevur eitt lítið tjald, sum hann skal sova í á vegnum.

- Eg vænti at tað fer at taka eina viku at renna gjøgnum Danmark, og so fari eg væntanti at hvíla einar tveir dagar, áðrenn eg haldi leiðina fram gjøgnum Týskland, Sveits, Frakland, Spania/Portugal inn í Gibraltar, sigur Robin Clementsen.

Robin Clementsen venur miðvíst og rennur í meðal 52 kilometrar um dagin fimm dagar um vikuna. Eisini hevur hann fyrireikað seg til ferðina við serliga proteinríkum kosti.

Tað er við vilja, at ferðin verður løgd so tíðliga á árinum, tí eg kenni, hvussu hitin er út á summarið har niðri móti Miðalhavinum, sigur Robin Clementsen.


**TVINGSILSSØLA YVIR MJÓLKAKVOTU**

**Týsdagin tann 14. desember 2010, kl. 9:15** verður á Dómaraskrivstovuni, Rættarsali IV, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir mjólkakvotu á 110.914 litrar.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040, www. lawfirm.fo** (sak nr. 5171301), sum kann geva nærri upplýsingar um mjólkakvotuna.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-59/2010).

**Føroya Fútarættur**


# Høgni spyr løgmann um Eik-málið

Høgni Hoydal, formaður Tjóveldis, hevur sett løgmanni ein munnligan fyrispurning um Eik-málið, og um landsstýrið hevur vent sær til donsku stjórnina viðvíkjandi Eik Banka.

Spurningarnir til løgmann eru tríggir í tali, og teir eru soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið biðið um samráðingar við donsku stjórnina um politisku ábyrgdina fyri framtíðini hjá Eik og føroyska fíggjarmarknaðinum?

2. Hví sita landsstýrið og samgongan á fundi við eitt partafelag sum Finansiel Stabilitet, sum ikki er ein politiskur samráðingarpartur, men eitt partafelag?

3. Hevur landsstýrið enn ikki skilt, at áhugamálini og skyldan hjá Finansiel Stabilitet er ikki at skapa stabilitet á føroyska fíggjarmarknaðinum, men at tryggja danska fíggjarmarknaðin og virðini hjá danska statinum?

**Viðmerkingar**

Tá sonevndu bankapakkarnir vórðu samtyktir, legði Tjóðveldi stóran dent á, og hevði tvey broytingaruppskot, har ábyrgdin fyri føroyska fíggjarmarknaðin skuldi leggjast hjá føroyskum myndugleikum og landsstýrið skuldi tryggja sær ábyrgd og ávirkan á Finansiel Stabilitet og tær avgerðir, ið har fóru at verða tiknar.

Eisini skeyt Tjóðveldi upp, at í lóggávuni skuldi standa, at føroyski fíggjarmarknaðurin er ein marknaður fyri seg, og at tískil skulu tey politisku tiltøkini taka støði í tí, har landsstýrið skuldi sita við borðið, táá avgerðir verða tiknar um føroysk viðurskifti.

Tá Eik við sera stuttari freist varð sett undir bjarging, kravdi Tjóðveldi í brævi til landsstýrið og síðani alment, at landsstýrið ikki bara setti seg sum áskoðara til avgerðir hjá Fíggjareftirliti og Finansiel Stabilitet, men tók upp samráðingar við donsku stjórnina beinanvegin um at taka ábyrgd og hava ávirkan á avgerðirnar.

Hesi uppskot vóru tíverri feld – og nú gongur sjón fyri søgn um avleiðingarnar.

Tað kann als ikki góðtakast, at føroyskir myndugleikar sum umboða føroyska fólkið, ikki taka politiska ábyrgd av at røkja áhugamálini hjá føroyska samfelagnum, men situr á fundi við eitt partafelag sum ein annar einfaldur íleggjari – meðan allar avgerðir liggja í hondunum á hesum partafelag.